Steffen Stummann Hansen, nýggjur landsantikvarur:

# Tað fullkomna starvið



*Kanska mest umtalaði persónurin í Føroyum í løtuni, nýggi landsantikvarurin Steffen Stummann Hansen. Hann sær starvið í Føroyum sum eitt sera áhugavert starv, og hann gleðir seg at koma til Føroya at starvast.*

**–Tað var ógvuliga nærliggjandi fyri meg at søkja hetta starvið, tá tað er hetta økið, eg havi fingist mest við. Tú kanst kalla hetta fyri tað ideella starvið fyri meg, sigur Steffen Stummann Hansen, nýggjur landsantikvarur**

LANDSANTIKVARUR
*Heri á Rógvi*

Hann er ikki ókendur í Føroyum. Nýggi landsantikvarurin fekk sítt fyrsta arbeiði sum útbúgvin fornfrøðingur í Føroyum. Tá var hann leiðari fyri útgrevstur á Toftanesi í Leirvík. Hetta arbeiðið var í tíðarskeiðum frá 1982 til 1987. Síðani tá hevur hann fleiri ferðir verið í Føroyum í arbeiðsørindum.

Útbúgvingin hjá honum er mag.art í forsøguligari í fornfrøði. Somuleiðis hevur hann lisið eitt sindur av søgu, og hann hevur fingið lektari døming og granskingar døming, soleiðis at hann hevur fullan førleika at undirvísa og granska.

Upprunaliga sergreinin hjá 48 ára gamla dananum var um Danmark um jarnøldini, men hann hevur seinni savnað sær servitan um fornfrøði í serliga Grønlandi, Írlandi og Føroyum.

### Upplagt

Fyri Steffen Stummann Hansen var hesin møguleikin, at gerast landsantikvarur í Føroyum, upplagdur.

– Tað var ógvuliga nærliggjandi fyri meg at søkja hetta starvið, tá tað er hetta økið, eg havi fingist mest við. Tú kanst kalla hetta fyri tað idella starvið fyri meg, sigur Steffen Stummann Hansen.

Hann er í løtuni í starvi hjá Danmarks Nationalmuseum, har hann arbeiðir fyri SILA – Nationalmuseet Center for Grønlandsforskning. Arbeiðið hjá honum snýr seg í løtuni um at gera eina bók um útgrevsturin á Toftanesi lidna. Samstundis arbeiðir hann eisini við trimum øðrum útgávum.

Tað er kanska nærliggjandi at hugsa sær, at ein maður við so drúgvum royndum sum Steffen Stummann Hansen heldur vildi hildið fram á einum stórum stovni sum eitt nú Danmarks Nationalmuseum, men soleiðis sær nýggi landsantikvarurin ikki upp á tað.

– Tað, at okkurt er stórt, merkir ikki altíð, at tað er gott. Føroya Fornminnissavn er tað nógv mest natúrliga staðið hjá mær at søkja, og eg gleði meg at taka við hesari avbjóðingini, sigur Steffen Stummann Hansen.

Tá hann byrjar í starvinum miðskeiðis í mars mánaði, so ætlar Steffen eisini at flyta til Føroya at búgva fast.

Hann skilur sum er heilt fitt av føroyskum, og hann sigur fara at royna, og hann vónar, at hann skjótt kemur á lagi at tosa føroyskt.

### Samstarv

Hóast hann ikki er komin til landið og byrjaður í nýggja starvinum, so hevur nýggi landsantikvarurin gjørt sær nakrar tankar um, hvørja framtíð hann kundi hugsað sær fyri Føroya Fornminnissavn.

– Tað er sera týdningarmikið, at Føroya Fornminnissavn verður meira sjónligt, og vit lata upp fyri størri samstarvsmøguleikum, har vit fara at samstarva um verkætlanir við fleiri av okkara grannalondum og onnur lond, sigur Steffen Stummann Hansen.

Hann sigur seg hava inntrykk av, at hølisviðurskiftini hjá Føroya Fornminnissavnið eru á góðari leið, men enn hevur hann ikki heilt fingið skoða sítt nýggjar arbeiðspláss.

### Onga viðmerking

Tað mugu vera fá, sum ikki hava lagt til merkis, at setanin av Steffen Stummann Hansen hevur skapt ikki sørt av politiskum roki. Sjálvur hevur Steffen Stummann Hansen ongar viðmerkingar til ábreiðslurnar til landsstýrismannin um politiska setan.

– Eg havi søkt hetta starvið við mínum fakligum kvalifikatiónum sum grundarlag. Eg havi verið til setanarsamrøður, og so eru tað onnur, sum hava mett, at eg var besti umsøkjarin, sigur Steffen Stummann Hansen.

Nýggi landsantikvarurin er heldur ikki í iva um, at hann er førur fyri at røkja starvið sum landsantikvarur við nógvu útgávunum og drúgvu royndum sínum í huga.

Steffen Stummann Hansen tekur við landsantikvarur miðskeiðis í mars.

## Um Steffen

Nýggi landsantikvarurin, Steffen Stummann Hansen, er føddur 29. januar 1955, og hann er sostatt júst fyltur 48 ár.

Hann tók studentsprógv í Rødovre í 1973. Í 1983 varð hann útbúgvin mag. art. í forsøguligari fornfrøði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Í sínum lestarárunum luttók hann eisini við fleiri høvi í fornfrøðiligum útgrevstrum.

Frá 1982 til 1987 var hann leiðari fyri útgrevstrinum hjá Fornminnissavninum á Toftanesi í Leirvík.

Hann hevur eisini starvast sum inspektør á Gilleleje Museum í áttatiárunum. Seinni hevur hann arbeitt víðari útgrevstrinum á Toftanesi, og hann fæst í løtuni við at skriva eina bók um evni í sínum arbeiði á Danmarks Nationalmuseum. Hann hevur eisini fingist við eina røð av øðrum uppgávum í sambandi við útgrevstur.

Í nýtiárunum hevur hann millum annað fingist við at undirvísa. Hann fekk lektara døming á lærda háskúlanum í Keypmannahavn í 1996, og hann starvaðist sum granskingarlektari har frá 1996 til 1999.

Hann hevur eisini verið tilknýttur eina longri røð av verkætlanum, sum serliga hava verið knýttar at Føroyum, Grønlandi, Hetlandi og Írlandi.

Hann starvast í løtuni á Danmarks Nationalmuseum á Sila – Nationalmuseets center for Grønlandsforskning.

Hann hevur fingið játtað pening frá Sila til at gera eina bók um útgrevsturin á Toftanesi lidnan. Samstundis fæst hann eisini við tvær aðrar útgávur.

Samlaði útgávulistin hjá Steffen Stummann Hansen er drúgvur og fjølbroyttur. Hann hevur útgvið ein hóp av bókum og greinum um fornfrøðilig viðurskifti, sum einamest snúgva seg um øki sum Danmark, Føroyar, Grønland, Hetland og Írland.

Hann hevur seinnu árini verið á vitjan í Føroyum nakrar ferðir, millum annað helt hann ein fyrilestur í Vági í fjør.

Steffen Stummann Hansen hevur eisini verið og er limur í fleiri nevndum og felagsskapinum. Millum annað sat í nevndini fyri danska magistarafelagið.

Steffen Stummann Hansen byrjar sum landsantikvarur miðskeiðis í mars.



# Stríð um setanarpolitikk

**– Tað er ikki brot á setanarpolitikkin ikki fylgja einum tilmæli. Tað er heldur ein spurningur um, hví landsstýrismaðurin velur ikki at fylgja tilmælunum, sigur Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri. Annlis Bjarkhamar og Anfinn Kallsberg hava hvør sína áskoðan um setanarpolitikkin**

SETAN
*Heri á Rógvi*



*Annlis-Anfinn: Annlis Bjarkhamar og Anfinn Kallsberg kunnu ikki semjast um, hvussu best at røða um setanarpolitikkin hjá landsstýrinum.*

Gjørdi Annlis Bjarkhamar rætt, tá hon setti Steffen Stummann Hansen sum landsantikvar, eftir at setanarbólkurin tvær ferðir hevði tilmælt einmælt, at Símun V. Arge skuldi setast í starv. Hetta er spurningur, sum tað flestu av fjølmiðlunum í løtuni royna at fáa svar upp á. Frá politiskari síðu verður somuleiðis leita við øllum hugsandi amboðum eftir at fáa greiðu á málinum.

Í Sosialinum hósdagin søgdu bæði Andras Mortensen og Arne Thorsteinsson, at eftir teirra tykki var talan um eina politiska setan, har politisk fyrilit vórðu tikin framum tey fakligu.

Løgmaður hevur gjørt greitt, at málið ikki er í tráð við setanarpolitikkin hjá landsstýrinum. Men Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður, sum hevur ábyrgdina av setanini, heldur, at setanin var í tráð við setanarpolitikkin hjá landsstýrinum.

Av nógvu skrivinigini um evnið og úttalilsum hjá løgmanni, so hevur Annlis Bjarkhamar sent út eitt tíðindaskriv. Hon hevur tó ikki verið at fingið hendur á til eina viðmerking, hóast dúgliga hevur verið roynt.

– Í fjølmiðlunum og á tingsins røðarapalli havi eg í dag hoyrt tíðindafólk og Løgmann leggja undirritaðu undir at hava brotið almenna starvsfólkapolitikkin í sambandi við setanina av landsantikvari. Hartil verður róð fram undir, at talan er um eina politiska setan.

Hetta vil eg ikki hava sitandi á mær. Eg undrist stórliga á, at slíkt verður ført fram, uttan at Løgmaður hevur kannað málið ella vísir á, hvar almenni setanarpolitikkurin er brotin, ella hvørjar grundgevingar eru skeivar í málinum, sigur Annlis Bjarkhamar í tíðindaskrivi.

Hon endurtekur tað, sum hon eisini verður endurgivin fyri at siga í Sosialinum hósdagin, at setanin byggir á fakligar og væl grundaðar grundgevingar, sum hon til eina og hvørja tíð kann standa inn fyri.

Hon sigur seg einki hava ímóti, at málið verður tikið um av einum kærumyndugleiki, tí alt er farið rætt fram í málinum, og hon avvísir staðiliga, at talan er um nakra politiska setan.

Hon eggjar til, at málið verður lýst til fulnar, men vil framvegis ikki siga nakað ítøkiliga um sína avgerð, annað enn, at besti umsøkjarin varð settur, og tað er sakliga grundað.

– Eg eri fegin um, at ætlanin er at kæra málið til Løgtingsins Umboðsmann, har málið kann lýsast av óheftum. Og eg heiti á einstaklingar ella fakfeløg teirra um at leggja málið fyri Umboðsmannin.

Eg taki fulla ábyrgd av gongdini og avgerðunum í hesum máli, og tað tykir mær rangvørt, at niðurstøður verða gjørdar, áðrenn nakar hevur sett seg inn í málsgongdinal, sigur Annlis Bjarkhamar.

Aðrastaðni sæst at lesa, at løgmaður hevur sett síni fólk at hyggja nærri at málinum.

### Í tráð?

Løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttir, sigur, at arbeiðið hjá einum setanarbólki er at gera eitt útgreindi arbeiði, sum skal stuðla avgerðini hjá landsstýrismanninum.

– Ein setanarbólkur, sum er settur saman við umboðum fyri leiðslu, starvsfólki og umboð fyri eitt nú ávísar bólkar, ið viðkoma starvsøkinum, skal fyrireika málið.

Uppgávurnar hjá bólkinum er at tryggja, at tann besti umsøkjarin úr einum heildasjónarmiðið fær starvið, og at umsøkjarar, ið ikki fáa starvið kunnu føla seg vísan í, at rætt er farið fram í málinum, sigur Marjun Hanusardóttir.

Hon leggur dent á, at hon ikki kennir til málið, men tosar yvirordnað umsetanarviðurskifti. Í skrivandi stund hevur Løgmansskrivstovan ikki móttikið tilfar um málið.

– Tað er ikki beinleiðis í stríð við setanarpolitikkin ikki fylgja einum tilmæli. Tað er heldur ein spurningur um, hví landsstýrismaðurin velur ikki at fylgja tilmælunum, sigur Marjun Hanusardóttir.

Løgmansstjórin sigur, at tey hava ikki havt líknandi mál til viðgerðar, men hava havt mál, sum í aðrar mátar hava havt við setanarpolitikkin at gera.


Mentamálaráðið
Landsantikvarur
MENTAMÁLARÁÐIÐ

*Hetta er lýsingin, sum stóð í føroyskum bløðunum fyri fyrstu ferð 28. september 2002. Fyriuttan at siga, at landsantikvarurin fær í minsta lagi 36.000 kr. um mánaðin, so er einki óvanligt við lýsingini, men seinni hevur Annlis Bjarkhamar tikið onnur atlit. Hetta kemur fram í brævið til Símun V. Arge.*

Starvsmannafelagið:

## Hyggja at málinum

**Starvsmannafelagið hyggur í løtuni at málinum um landsantikvarin við atliti at setanarpolitikkinum**

LANDSANTIKVARUR
*Heri á Rógvi*

Tað er ikki bara Magistarafelagið, sum hevur áhuga fyri málinum viðvíkjandi setanini av nýggjum landsantikvari.

– Vit fylgja við málinum, men vit eru ikki farin upp í málið, tí sjálv setanin liggur ikki hjá okkum at viðgera, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum.

Fleiri av limum Starvsmannafelagsins arbeiða á Føroya Fornminnissavnið, og felagið hevur og fer at tosa við sínar limir um starvssetanina av nýggjum landsantikvari.

Gunnleivur Dalsgarð leggur stóran dent á, at teir bara fylgja við í málinum. Tað er serliga við atliti at setanarpolitikkinum.

– Skal mann hava ein setanarpolitikk, so er neyðugt at fylgja honum. Annars kann mann bara lata vera við at hava nakran tílíkan politikk, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Málið er í skrivandi stund spildurnýtt fyri Starvsmannafelagið, og Gunnleivur Dalsgarð vil ikki gera aðrar viðmerkingar til málið. Hann vil einki siga um, hvørji møgulig tiltøk ella onnur stig felagið ætlar ella kundi hugsa at tikið.